gult cyan magenta svart



# Fortíðin krevur at føroyingar eru varnir

**Hernaðarmál og tann politikkur, sum hevur samband við slík viðurskifti, hevur stóran týdning globalt og fyri einstakar tjóðir. Í Føroyum hava vit ásannað, at myndugleikarnir hava dult mangt í hesum sambandi fyri føroyingum. Hernaðarliga støðan í heiminum yvirhøvur og eisini á okkara leiðum ger, at vit mugu verða varin og fylgja við í tí sum hendir, heldur Jákup Thorsteinsson, søgufrøðingur**

SØGUGRANSKING

*Eyðun Klakstein*

Seinastu tvey árini hevur hann kastað ljós á ókend politisk og hernaðarlig viðurskifti í Føroyum.

Hann hevur staðfest, hvussu tað dulda politiska spælið var, tá hernaðarligar útbyggingar skuldu gerast í Føroyum í fimtiárunum, og hann hevur lagt fram týðandi upplýsingar um hernaðarpolitisk viðurskifti upp gjøgnum tíðina.

Jákup Thorsteinsson skrivaði frágreiðingina Hernaðarmál og politikkur, sum var onnur av tveimum frágreiðingum í Svørtubók. Hetta var ein ávegisfrágreiðing um støðu Føroya í kalda krígnum, og fyrr í ár gjørdi hann eina ískoytisfrágreiðing til hesa frágreiðing.

- Tá eg fór undir arbeiðið til Svørtubók, fekk eg eina fatan av politisku støðuni í Føroyum, sum eg ikki var greiður um frammanundan. Knappliga bar tað til at síggja, at altjóða áhugi hevur verið fyri Føroyum, og tað bar eisini til at staðfesta, at Føroyar hava havt eina týðandi strategiska støðu í Norðuratlantshavinum, sigur Jákup Thorsteinsson.

Hann tók útbúgving sum søgufrøðingur í Keypmannahavn í 1972, og í 1990 vardi hann doktararitgerð á universitetinum í Århus. Hann starvaðist í 16 ár sum lærari á Studentaskúlanum í Hoydølum, men síðani 1990 hevur verið embætismaður og granskari.

- Eg havi havt áhuga fyri søgu, síðani eg var smádrongur, og fyri meg var tað púra náttúrligt, at eg fór at lesa søgu eftir studentaskúlan. Fakið hevur altíð hugtikið meg. Tað er millum annað tankin um, at tað hava verið onnur og øðrvísi samfeløg, sum hevur verið spennandi, sigur hann.

## Keldurnar eru lykilin

Søguskrivingin er gomul. Grikkarnir skrivaðu søgu, hóast tað var øðrvísi søguskriving enn tann, vit kenna í dag, og teir grundløgdu nakrar av teimum grundleggjandi lutunum innan søguskriving.

Tá snúði søgan seg fyrst og fremst um gerðir hjá djørvum monnum, kongum og londum, og hetta slag av skriving sæst eisini aftur hjá Saxo í Danmark og íslendskari søguskriving í miðøldini.

Lykilin til søguskriving er keldutilfar. Søguligar keldur eru alt tað sum sigur frá, at fólk hava livað og virkað, og tað finnast bæði skrivaðar og óskrivaðar keldur - søgugranskarar nýta tó ofta skrivligar keldur, serliga í verki sum Hernaðarmál og politikkur.

- Fyrst og fremst snýr tað seg um at finna keldurnar fram, síðani skulu tær viðgerast og greinast, og har er tað, at keldukritikkurin hevur ein týðandi leiklut, tí hann skal avgera, hvat av tilfarinum kann brúkast, greiðir Jákup Thorsteinsson frá.

- Søguskriving er at skriva um um menniskju til ymsar tíðir, at læra av tí og at gera eina mynd av fortíðini, sum er so saklig og neyv sum gjørligt. Tað er ikki einfalt at tosa um objektivitet og subjektivitet, men søguskrivarar skulu hava ein sakligan hugsunarhátt og viðgerðarhátt. Tað er eitt gott og erligt mál at hava, tá tú viðger søguligt tilfar, sigur Jákup Thorsteinsson.

## Søgan endurtekur seg - ikki

Søguskrivingin er nógv broytt frá fyrstan tíð og fram til dagin í dag. Serliga síðani 18. og 19. øld kann tosast um eina veruliga faksliga søguskriving, sum í granskingarprinsippum og høvuðstankum líkist øðrum vísindaligum logiskum hugsunarhátti.

Hendan søguskriving skal viðføra eina so professionella lýsing sum gjørligt av søguligum viðurskiftum.

- Eg kann ikki hugsa mær føroyingar sum søguleysur. Søgan er - hóast hon ikki øll er faksøga - ein avgerandi partur av føroysku mentanini, og tú hoyrir í dagligari talu, hvussu nógv føroyingar tosa um gamlar dagar. Eitt søguleyst fólk hevði verið eitt fólk uttan minni, tí søga er eisini minni.

Ein av teimum slitnu vendingum, tá tað snýr seg um søgu, er, at søgan endurtekur seg, men tað ger hon ikki.

- Søgan endurtekur seg ikki. Hon kann ikki endurtaka seg, tí tað, sum er hent einaferð, kann ikki henda aftur á sama hátt. Persónarnir eru deyðir, og fortreytirnar fyri hendingunum eru broyttar, men líknandi hendingar kunnu koma fyri - hendingar sum minna um tað, sum fór fram í gomlum tíðum, vísir Jákup Thorsteinsson á.

- Tá vit hava við søgu at gera, tosa vit um eina vísind, sum ikki er tann sama sum onnur vísind. Tað er eitt sindur lættari at ávísa objektivar sannleikar, tá tú arbeiðir við aðrari vísindi, men ein søgufrøðingur skal royna at vera sakligur sum gjørligt, og hann skal royna at lýsa eitt evni út frá fleiri sjónarmiðum fyri at fáa javnvág í.

## Søguskriving uttan gølur

Løgtingið samtykti í apríl mánaði í 1996, at skjøl, sum kundu lýsa hernaðarligu støðu Føroya undir kalda krígnum, skuldu savnast. Hesi skjøl skuldu finnast í Føroyum, Danmark og USA.

Løgmaður setti ein stýrisbólk við fýra fólkum at standa fyri hesum arbeiði, og Jákup Thorsteinsson var ein av hesum. Hann leitaði saman við Jóannesi Dalsgaard eftir skjølum í Danmark, og hann skrivaði ávegisfrágreiðingina um hernaðarmál og politikk, sum leggur nógvar nýggjar upplýsingar á borðið.

- Tú skalt verða varin í hernaðarligari gransking, men tú skalt leggja fram tað, sum hevur almennan týdning. Tað sum føroyingar hava krav um at kenna er, hvør føroyski leikluturin var, og hvussu politiski leikurin fór fram. Nógv av tí, sum fór fram, var dult fyri føroyingum at politiskum orsøkum, sigur Jákup Thorsteinsson.

- Søguskriving skal ikki gerast til sensatiónir og gøluskriving, og tað haldi eg heldur ikki, at tað er gjørt í Svørtubók. Nógv verður avdúkað, men har ræður um at skriva tað, sum tað er.

Svartabók er ikki ein verulig søgulig ritgerð, tað er ein frágreiðing. Meira arbeiði skal gerast, áðrenn talan kann vera um eina fakliga ritgerð, men ein møguleiki er, at søgufrøðingar halda fram við arbeiðnum, og tað so seinni verður til veruligar ritgerðir, og so kemur rættilig vísind uppí.

- Tað evni, sum er viðgjørt í Svørtubók, skulu vit ikki brúka til at sláa nakran í høvdið við. Vit skulu læra av tí og siga, at vit mugu vera varin framyvir. Kalda kríggið er kanska liðugt, men heimurin er ikki avvápnaður, og tað verður hann neyvan, sum støðan nú er við nýggju verjuætlanini hjá USA og aðrari hernaðarligari útbygging - eisini í triðja heiminum.

- Eg kann ikki avvísa, at líknandi hendingar, sum eru viðgjørdar í Svørtubók, fara at koma fyri aftur - at sannleikin verður duldur fyri føroyingum um hernaðarlig mál. Tí mugu føroyingar og føroyskir politikarar verða varnir.

- Vit kunnu ikki hava eina politiska skipan sum ger, at okkara politikarar gerast til statistar í altjóða politikki, tá tað snýr seg um føroysk mál og um lagnuna hjá føroyingum. Eg skal ikki tosa politikk, men eg kundi ynskt mær, at føroyskir politikarar fingu størri ávirkan í eitt nú hernaðarmálum.

## Politikarar og fjølmiðlar sakligir

Jákup Thorsteinsson var var um 16 ára gamal, tá støðin í Mjørkadali varð bygt, so hann minnist tíðina. Hann minnist mótmælini og blaðskrivingina, og tí hevur tað eisini verið áhugavert hjá honum at viðgera hetta evni sum søgufrøðingur.

- Teir politikarar, sum tá sótu í andstøðu vóru sera atfinningarsamir móti tí, sum fór fram. Fólk vóru eisini nervøs, og tað vóru nógv illgitingar. Soleiðis verður tað altíð, tá tú fjalir nakað fyri fólki.

- Tá tú arbeiðir við eini fakligum evnum, verður tín uppfatan av tí broytt, tí tú fært størri vitan og innlit í evnið. Soleiðis hevur tað eisini verið, nú eg havi arbeitt við hernaðarmálum og politikki. Tað hevur helst eisini ávirkað mína politisku fatan, heldur Jákup Thorsteinsson.

Svartabók staðfestir, at føroyskir politikarar formáddu sær lítið í tí stórpolitiska spælinum, sum er kring hernaðarlig viðurskifti.

- Tað vóru tey stóru londini, sum avgjørdu hvat skuldi henda innan verjupolitikkin. Eitt lítið land sum Danmark hevði lítið at siga, og enn minni høvdu Føroyar nakra ávirkan.

Í amerikanskum keldum ber til at síggja, at í Washington var tosað um, at kanska áttu danir at havt verið eitt sindur meira opnir mótvegis føroyingum í hesum málum.

Beinleiðis hernaðarligir loynidómar kundu ikki gerast almennir, men amerikumenn hildu, at danir vóru ov varnir, tá teir góvu føroyingum upplýsingar um hernaðarlig viðurskifti. Tað kundi beint fyri nakað av óttanum hjá fólki, hildu teir.

- Eftir at Svartabók kom út, eru tað nógv fólk, sum eru komin til mín og hava havt hug at tosa við meg um hana. Og tá tú so eisini tekur við, at Svartabók rættiliga skjótt varð útseld, má áhugin fyri hesum evnunum metast at verða stórur. Eg eri glaður fyri tær samrøður, sum eg havi havt við fólk um bókina. Fólk hava víst áhuga, og tey minnast tíðina, sigur Jákup Thorsteinsson.

- Fyri meg hevði tað stóran áhuga, hvussu Svartabók varð móttikin av fjølmiðlum og alment annars. Og eg eri fegin um, at hon var móttikin á ein sakligan hátt, og viðgerðin í fjølmiðlunum var góð og professionell. Bæði politikarar og fjølmiðlar hava víst, at teir hava dugað at handfarið bókina.

## Tímir ikki tannleysa søguskriving

Uppgávan hjá søgufrøðingum er at finna alt hugsandi tilfar fram um tey viðurskifti, sum teir skulu royna at lýsa.

Tá tilfarið er fingið til vega, skal søgufrøðingurin tulka tað og royna at staðfesta, hvat tað var, sum fór fram.

- Tú kanst gera ein niðurstøðu, tá tú hevur viðgjørt eitt evni nóg keldukritiskt og nóg gjølla fakligt. Í Svørtubók havi eg gjørt nakrar niðustøður - lutvíst politiskar og lutvíst hernaðarpolitiskar - og tað haldi eg skal gerast. Gert tú ikki eina niðurstøðu í sambandi við slíka søguliga lýsing, so verður hon tannleys, og eg tími ikki tannleysa og einkisigandi søguskriving, sigur Jákup Thorsteinsson.

- Tær niðurstøður, sum eg havi gjørt, kunnu sjálvandi diskuterast, tí verkið er ikki liðugt. Vit hava góðar keldur, bæði úr USA og úr Danmark, til at byggja hesa søguskriving á, men hevði eg skrivað Svørtubók sum eina ritgerð, hevði eg fingið meira fjølbroyttar og betri lýsingar og niðurstøður.

Tað er ikki altíð lætt at gera eina rættvísandi mynd av søguligum hendingum, men betri skjalatilfar ein søgufrøðingur hevur, og meira nágreiniliga hann arbeiðir, lættari er at gera eina haldbara niðurstøðu.

- Eg havi ávarað ímóti, at ábyrgdarfólk frá tíðini 50'unum og 60'unum verða einsíðis dømd av fólki, tí hóast tað ber til at vísa á, hvat er farið fram, kann tað vera hent nakað afturat, sum vit einki vita um. Tað kann kanska broyta eina niðurstøðu til tað betra.

- Eg veit ikki nóg mikið um munin ímillum danska og amerikanska skjalalóggávu, men fyri mær tykist tað, sum amerikumenn eru meira opnir, tá tað kemur til søgulig skjøl. Tilfarið úr USA og Danmark er sera umfatandi, men eg kann ikki við vissu siga, at vit hava fingið innlit í øll skjøl. Tað ber ikki til at vita í slíkum førði, tí tað kunnu verða skjøl, sum myndugleikarnir halda vera av so stórum týdningi fyri samfelagið, at tey kunnu ikki gerast almenn.

## Ovfarin av vitanini hjá USA

Ein av teimum spurningunum, sum søgugranskarar skulu taka støðu til, tá teir lýsa søguligar hendingar, er, hvussu nær teir kunnu fara persónunum, sum hava við málini at gera. Í hernaðarligari gransking er hesin spurningur kanska serliga eymur, tí talan er ofta um umstrídd mál.

- Í eini slíkari frágreiðing sum Svørtubók skulu vit halda okkum frá tí, sum bara hevur við persónlig viðurskifti at gera. Politikarar og embætisfólk taka avgerðir og handla undir ábyrgd, og tá hesar avgerðir hava við málið at gera, skulu tær leggjast fram, sigur Jákup Thorsteinsson.

- Um vit til dømis ikki høvdu lagt tað fram, sum snúði seg um vitanina hjá føroyskum og donskum politikarum í sambandi við hernaðarmál, so hevði meiningin við Svørtubók verið burtur.

Í arbeiðnum við Svørtubók vóru persónligar upplýsingar lagdir til viks, tí tær vóru óviðkomandi fyri frágreiðingina.

- Tá eg sá, hvussu nógv amerikumenn vistu um Føroyar, trúði eg, at tað var lygn. Teir høvdu lýst føroyska samfelagið út í æsir. Teir vistu vinnuvegirnar hjá okkum, hvussu veik fiskivinnan var í 50'unum, hvussu nógvan fisk vit seldu, hvussu nógvir skúlar vóru í Føroyum, hvussu nógvir politiskir flokkar vóru í landinum, og teir kendu nøvnini á øllum teimum týðandi politikarunum, mentafólki og embætisfólki.

- Í skjalatilfarinum úr USA eru nógvar lýsingar av føroyskum politikarum og av donskum og føroyskum embætisfólki, men tá upplýsingarnar hava snúð seg um privatlívið hjá hesum fólkum, havi eg latið tær ligið. Høvdu hesar upplýsingar havt politiskan týdning, hevði eg sjálvandi lagt tær fram.

Amerikumenn gjørdu persónlýsingar av øllum teimum týðandi politikarunum og embætisfólkinum, kannaðu hvørjar teirra sterku síður vóru, og hvørjar teirra veiku síður vóru. Teir fingu sínar upplýsingar frá til dømis amerikanarum, sum vóru í Føroyum, frá føroyingum, frá ríkisumboðnum og frá donskum ráðharrastovum.

- Eg kundi havt tagt hetta heilt burtur, men eg valdi at nevna í Svørtubók, at hesar upplýsingar finnast, tí tað er púra vist, at eftir meg fara søgufrøðingar at granska hetta tilfarið, og tá fara teir at koma fram á hesar upplýsingar, sum eg ikki havi tikið við.

## Ongar avdúkingar eftir

USA vildi vita, hvussu føroyska samfelagið var samansett, og hvussu viðurskiftini vóru her hjá okkum, tí NATO skuldi gera stórar íløgur her. Teir fylgdu við í stóru verkføllunum, sum vóru tá, og teir fylgdu eisini væl við í eitt nú læknastríðnum í Klaksvík.

- Amerikumenn vóru áhugaðir í friði og javnvág í Føroyum, og teir vildu ikki hava politiska og sosiala ónøgd í landinum. Tí søgdu teir dønum, at teir máttu lata føroyingar fáa somu sosial og livikor sum danir.

Hetta gevur úrslit síðst í fimtiárunum, tá føroyingar fáa lóg um fólkapensjón, og aðrar ábøtur verða gjørdar, so tað verður lættari at búgva í Føroyum. Nøkur ár seinni staðfesta amerikumenn, at nú hava føroyingar tað betri, og nú eru teir ikki so politiskir, eitt nú í tjóðskaparmálum, sum teir vóru fimtiárunum.

- Eg havi ikki latið nakað týðandi skjal ligið eftir í mínari viðgerð, og eg vil meta, at við tí sum nú er skrivað, verða tað neyvan fleiri avdúkingar innan hernaðarmál og politikk. Tað verður neyvan nakað, sum broytir tað fatan, sum vit hava fingið burtur úr okkara gransking, heldur Jákup Thorsteinsson.

- Fakliga verður frágreiðingin uttan iva betur, um føroyingar fáa upplýsingar úr Eystureuropa. Tað er viðkomandi at fáa at vita, hvat Warzawa-londini hildu um viðurskiftini í Føroyum, og hvønn leiklut hildu tey okkum hava.

Løgmaður hevur boðað frá, at ein kanning í skjalagoymslum eystanfyri skal setast í verk fyrst í komandi ári.

Tá hendan kanning kemur á mál einaferð í framtíðini, vita vit helst enn meira um føroysku støðuna og leiklutin undir kalda krígnum.

Hetta er kanning og søguskriving, sum skal avdúka dulda virksemið og onnur hernaðarlig og politisk viðurskifti í sambandi við hernaðarmál í Føroyum, og hetta er ein søga, sum føroyingar meta sum sín rætt kenna.



*- Tá eg sá, hvussu nógv amerikumenn vistu um Føroyar, trúði eg, at tað var lygn, sigur Jákup Thorsteinsson.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





*- Vit kunnu ikki hava eina politiska skipan sum ger, at okkara politikarar gerast til statistar í altjóða politikki, tá tað snýr seg um føroysk mál og um lagnuna hjá føroyingum, heldur Jákup Thorsteinsson, søgufrøðingur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*